# Hondbóltskappingin í vanda

**Bert trý dómarapør tykjast til reiðar at døma fyrstudeildarhondbólt í kappingarárinum, sum byrjar um knappan mánað Vandi tykist samstundis vera fyri, at bestu dómarapørini gevast við dømingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tað tykist nú vera vandi fyri, at bestu hondbóltsdómararnir ikki fara at døma í landskappingini í vetur*

Fyri stuttum lýsti Dómarafelagið við, at teir í vetur ætlaðu sær enn eitt stig longur á leiðini í menningini av føroyskum hondbóltsdómarum. Ein menning, sum av álvara byrjaði í fjør, tá dómarafelagið varð sett á stovn, samstundis sum ein eygleiðaraskipan varð sett í verk.

At hjálpa sær í hesum hevði Dómarafelagið fingið danska Frank Smith til landið. Hesin er fyri stuttum givin sum altjóða dómari, og í Danmark er hann væl lýddur sum dómaraeygleiðari og –instruktørur.

Ætlandi skuldi skeið eisini haldast fyri føroyskum dómarum hetta vikuskiftið, men tað skeiðið er nú avlýst.

## Bert trý pør

Orsøkin til avlýsingina var, at bert trý dómarapør høvdu teknað seg til skeiðið. Eitt skeið, sum samstundis er sett sum krav til dómarar, ið skulu døma í bestu hondbóltsdeildini komandi kappingarár.

Og hetta tykjast vera ein skelkandi boðskapur hjá dómarafelagnum. Tá felagið varð sett á stovn, vóru nógv umboð fyri dómarar savnaði, og eisini til fyrsta skeiðið, var uppmøtingin stak góð.

At tað nú bert eru trý pør, sum tykjast áhugað í hondbóltsdøming, kann í ringasta føri fáa katastrofalar avleiðingar fyri dømingina til komandi kappingarár.

Dómarafelagið sjálvt vil ikki gera nakrar serligar viðmerkingar, uttan at vísa til skrivið, sum er sent feløgunum hesum viðvíkjandi, men sum vit hava skilt støðuna, so er vandi fyri, at bestu føroysku dómararnir als ikki vera at síggja í kappingini í vetur. Felagið setir framvegis sum krav, at skeiðið skal takast, um Dómarafelagið skal standa fyri dømingini í vetur, og fæst ikki nøktandi undirtøka fyri hesum, skilja vit, at tey trý pørini, sum ætlaðu sær á skeiðið, als ikki fara at døma. Tey trý pørini eru Hannis og Uni Wardum, Sámal Hansen-/Kristian Johansen og teir báðir klaksvíkingarnir, Karsten og Kristian Joensen.

Boðini til feløgini eru, at tað nú verður gjørd ein nýggj roynd at fáa skeiðið í lag, og hetta ætlandi verður vikuskiftið, 8. og 9. oktober.

## Álvarsligar avleiðingar

Um avleiðingarnar av støðuni – um hon ikki batnar – sigur dómarafelagið at enda, at teir síggja hetta sum eitt seinasta útkall hjá føroyskum hondbólti.

– At tosa um luttøku í altjóða kapping, má sigast at vera púrasta burturvið, um vit ikki somikið sum megna at fyriskipa heimligu kappingina undir karmum, sum kunnu metast bara nøkunlunda forsvarligir, verður staðfest í endanum av skrivinum, sum varð sent feløgunum fríggjadagin.

Aðra staðni í skrivinum verður eisini staðfest, at alternativið til eitt samlað dómarafelag er, at farið verður aftur til gomlu skipanina, har tað varð álagt hvørjum felag at stilla við einum dómaraparið, og at tað so ikki varð tosað meira um kvalitetin í dømingini.

Tað er í øllum førum ein støða, sum hvørki leikarar ella áskoðarar vilja koma aftur í. Ofta plagdi orðadrátturin tá at vera harður, tí leikarar í rivaliserandi liðum dømdu dystir hjá hvørjum øðrum, og tá útfallið í hesum ofta kundi hava avgerandi ávirkan á stigatalvuna, varð sjálvt minsta mistakið vigað væl og virðiliga í mannamunni.

So sum støðan sær út í løtuni, tykist hondbólturin av álvara at vera komin til eitt vegamót. Nógv orka, tíð og pengar eru nýtt til tess at sleppa aftur upp í part í altjóða kappingum, men onkur skal eisini leiða dystirnar, og tað vildi verið stórt spell, um tann parturin lá eftir.






Vikuskifti
Nr. 173 • leygardagur • 11. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Tinghellan
– nýtt debatforum
í Sosialinum
TING-HELLAN
síða 11–16



*Sølvi, Kristin, Páll, Jákup Andrias og Jóhannes vóru sera hugagóðir ein dagin í vikuni, tá teir vóru farnir at fanga síl í Ósánni í Klaksvík*

# Hugagóðir sílafangarar

Fimm smádreingir høvdu ein góðveðursdag fyrr í vikuni fingið sær glúp og spann í hond. Teir høvdu í hyggju at royna at fanga nøkur síl ella ternumurtar í Ósánni. Teir sóust renna runt á tí nýfylta økinum við Sandin í Klaksvík beint eftir skúlatíð

FRÍTÍÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Í dag verður nógv tosað um, at børn ikki spæla nóg nógv úti. At tey bara sita inni og spæla telduspøl ella lata seg passivt undirhalda av sjónvarpinum. Um so er ella ikki, skal her verða ósagt, men ein dagin í vikuni, sóust fimm fittir smádreingir í aldrinum átta til tíggju ár renna við glúpi á økinum, sum er fylt út við Sandin.

Hesir dreingirnir, sum eita, Páll, Jákup Andrias, Jóhannis, Kristin og Sølvi vóru í ferð við at fanga síl. Teir vóru hugagóðir, og vónirnar um at fanga nógv, vóru góðar.

Teir høvdu tó ikki fangað nøkur síl, tá vit hittu teir, men Sølvi vísti tó errin, at ein ternumurtur lá í spannini.

– Her eru tveir ternumurtar, men tann eini er deyður. Hann funnu vit beint heryviri, greiðir Sølvi frá.

Hinir fýra renna runt allatíðina og hyggja væl og virðiliga niður í Ósánna, sum rennur út í sjógvin beint har, sum útfyllingin fer fram. Allatíðina eygleiða teir vatnið fyri at vita, um ikki ein ternumurtur ella eitt síl kemur svimjandi.

Jákup Andrias sigur, at tað er ordiliga gott at fanga síl har, nú síðani menninir eru farnir at fylla út.

– Eg sá tvey síl, haldi eg, at tað var, greiðir hann frá, meðan hann vísir við hondunum, hvussu stór síl, talan var um.

Jóhannis og Kristin hava hvør sín glúp, og teir standa og hyggja við munnan, har áin rennur út fyri at vita, um teir ikki bera eyga við onkur síl ella okkurt annað, sum teir kunnu fanga.

Ferð eftir ferð stinga teir glúpin niður í sjógvin, men har kemur onki í.

So rópa teir á hinar og siga, at teir fara yvir um at royna. Tað merkir, at teir heldur leggja sær leiðina yvir har, sum áin rennur beint við Norðoya Sparikassa.

– Har fara vit so at royna at fanga okkurt eina løtu, sigur Jákup Andrias í tí hann fer rennandi aftan á hinum dreingjunum, sum longu eru komnir hálva leið yvir um vegin.

## Síl í Ósánna

Fyri nøkrum árum síðani fór ein verkætlan í gongd, sum fekk heitið Síl í Ósánna. Tað er ein áhugabólkur í Klaksvík, sum stendur aftan fyri hetta. Tað gongur, sum skilst, rætta vegin við hesari verkætlanini, og tað kunnu hesir fimm fittu smádreingirnir eisini vera eitt tekin um. Tí óivað høvdu teir heldur lagt sær leiðina út í Grøv, um onki síl ella nakað var at fanga í Ósánni. Og tað kann so bara vera hugaligt fyri bæði dreingir og áhugabólk frameftir.